**Sankta Frans skúli**
Varðagøta 10 - 100 Tórshavn.
Tlf. 302530 – Fax. 302531
www.skulin.fo/fra

## Forskúlalærarastarv í Sankta Frans skúla

**Søkt verður eftir forskúlalærara skúlaárið 2008/9**

Av tí at ein forskúlalærari fer í farloyvi, verður søkt eftir avloysara komandi skúlaár.
Starvið verður sett **1. august 2008**
Fyrimun hava umsøkjarar við royndum í líknandi arbeiði
Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.
Lønarbrotið er 0,47

**Vit vænta, at tú:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan
- ert fyrikomandi, virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi **leygardagin. 23. juni 2008. kl. 12.00**

Nærri fæst at vita um størvini hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532 / 220716 ella hjá Jákup Lindberg, varaskúlastjóra, tlf. 302533 / 282533

*Í Sankta Frans skúla eru 300 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan*



# LÆRARI
## til Haraldssunds skúla

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
undir abyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærara skúlans skal undirvísa
og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
duga at samstarva og vera fyrikomandi
er fúsur at átaka sær tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Førleikakrøv:**
Haraldssunds skúli er einflokkaður, tí hava vit brúk fyri lærara, sum kann undirvísa í øllum lærugreinum í 1. – 7. fl.

Starvið fevnir um 10 avlopst/v til allar vanligar lærugreinar umframt 10 t/v til serligan tørv.

**Starvið verður lønt**
í lønarflokkum 18.1 – 29.2 sambart avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsókn við avriti av prógvi, cv og møguligum ummælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2008.

**Send umsóknina til:**
Magnu Thomassen
785 Haraldssunds Skúli

**Meira fæst at vita um starvið á:**
tlf. 457336 skúlin
tlf. 455071 - 555071

**Ella skrivað til**
magna.thomassen@skulin.fo



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## STARV SUM LEIÐARI FYRI FUGLAFJARÐAR SLØKKILIÐI

Starvið sum leiðari fyri Fuglafjarðar sløkkilið, sum er ein deild av Fuglafjarðar kommunu, verður hervið lýst leyst til setan tann 1. juli 2008 ella skjótast eftir hetta.

**Krøv:**
- Viðkomandi skal hava handverksliga ella byggifrøðisliga útbúgving.
- Skal hava tikið ella skal taka neyðug skeið sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmanningum og brunaumsjónarmonnum.
- Skal verða við til at menna kommunala brunaverkið og brunamenninar, so sløkkilið altíð er á einum tekniskt forsvarligum støði.
- Heilsuváttan verður kravd.
- Skal hava stóra koyrikortið.
- Skal hava góð samstarvsevni.

**Lønar- og setannarviðurskifti:**
- Starvið, sum verður normerað til 15 tímar um vikuna, verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið.
- Fyrstu 3 mánaðarnir verða at rokna sum royndartíð.

**Nærri upplýsningar**
um starvið kunnu fáast við at venda sær til William S. Askham, sløkkiliðsleiðara á telefon 737800 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

**Umsóknarfreist:**
Skrivligar umsóknir saman við prósvkjølum skulu verða Fuglafjarðar býráð, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi hósdagin tann 19. juni 2008 kl. 16.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.





# Eigaraíbúð í hjartanum í Havnini til sølu

Sera snotilig eigaraíbúð í nýbygningi í M. Heinasonargøtu 13, Tórshavn, til sølu.

Íbúðin sum er á 1. hædd, er 54 m² til víddar og liggur í fjálgum og veðurgóðum umhvørvi mitt í Havnini.

Vælhóskandi til einstakling ella 2 persónar og fevnir búrúmið um køk og uppihaldsrúm í einum, umframt sovikamar og wc/brúsurúm. Herumfram er felags trappuuppgongd, 21 m² og vaskirúm til víddar 15 m².

Advokatarnir Hentze

DEMMUS HENTZE
landsrættarsakførari

TURIÐ DEBES HENTZE
advokatur og mediator m.m.c.r.

Tórsgøta 17 · Postboks 236 · FR 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · Telefaks 311490 · E-mail: hentze@hentze.fo
www. hentze.fo



MIÐVÁGS KOMMUNA

# KUNNGERÐ

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at Miðvágs bygdaráð á fundi tann 3. juni 2008 samtykti at broyta býarplanin fyri Miðvágs kommunu soleiðis, at ein partur av matr. nr. 408 og ein partur av matr. nr. 417 í Vatnsoyrum verður lagt sum B2-øki (sethúsaøki serstøk byggisamtykt).

Skjøl, sum vísir broytingina, liggja frammi til alment eftirlit á bygdaráðsskrivstovuni í arbeiðstíðini frá mánadegnum 9. juni 2008 til mánadagin 30. juni 2008 báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu skrivliga verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 09. septembur 2008.

**Miðvágs kommuna**
Tlf. 332429 · Fax 333429
midvagur@midvagur.fo · www.miðvagur.fo



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk